# EB/Streymur tók seg saman

*2.deild: Oddaliðið EB/Streymur var aftanfyri við trimum málum, tá dysturin var hálvrunnin, men teir megnaðu at koma afturí aftur og vunnu ikki minni enn 6-3*

STEFAN Í SKORINI

Seinastu tveir dystirnar hevur EB/Streymur skotið ikki færri enn trettan mál, harav vórðu tey seks skotin í seinna hálvleiki ímóti HB í Gundadali leygardagin. Liðini áttu hvør sín hálvleik, men EB/Streymur gjørdi sær betri dælt av sínari yvirvág í leiki enn havnarmenn gjørdu.

**Rutinan ikki nóg mikið**

Hjá HB vóru tað tvær gamlar rottur, sum gjørdu mest um seg frammanfyri málinum hjá gestunum. Fyrst var tað Gunnar Mohr, sum skeyt fyrsta málið í dystinum leygardagin, ið gjørdist ein sonn málveitsla. Jónleif Sólsker hevur funnið fótbóltsstivlarnar framaftur, og hann gjørdi tvey tey næstu málini hjá heimaliðnum. Jónleif hevur eins og Gunnar spælt á fyrsta liðnum hjá HB fyri nøkrum árum síðani, og teir vóru eisini føroyameistarar saman. Royndirnar hava tó ikki alt at siga í fótbólti, og tær rukku ikki langt, tá EB/Streymur kom út sum eitt ódnarveður eftir steðgin. 3-0 til HB var tó ikki ein røtt mynd av fyrra hálvleiki, men HB hevði tað neyðuga hepni.

Støðan var sostatt 3-0 til heimaliðið eftir fyrra umfar. Orðini hjá venjaranum, Bergi Magnussen, hava eftir øllum at døma givið hansara monnum ein hvøkk, tí útiliðið var ikki til at kenna aftur, tá dómarin floytaði dystin í gongd aftur.

Tað gingu tó tíggju minuttir áðrenn hol kom á, og so komu málini eitt fyri og annað eftir, uttan at HB verjan kundi steðga útiliðnum. Eyðfinn Joensen fekk tað fyrsta málið hjá EB/Streymi. Hann rak inn frá vinstru og við einum fløtum skoti úti við handaru stong, minkaði hann um munin til 3-1. Enn var langt eftir á mál, men eftir hetta komu málini títt. Átta minuttir seinni var tað longu 3-3. Dómarin dømdi brotsspark til EB/Streym, og tað setti Knút Vesturtún í netið, og løtu seinni var tað toppskjúttin í 2. deild, Jón Sigurð Gleðisheygg, sum javnaði.

Kaj Joensen legði gestirnar framum 4-3, og Jón Sigurð fekk tvey afturat, sum tekur hann framum Gunnar Mohr á málskjúttaralistanum. Jón Sigurð hevur nú skotið tíggju mál í hesum kappingarárinum.

EB/Streymur stevnir nú beint ímóti 1. deild, men enn er einki avgjørt, og tað verður kanska neyðugt at betra um verjuspælið, tí í tveimum teimum seinastu dystunum eru sjey mál farin inn, og tað er ov nógv fyri eitt oddalið.

Næstu ferð skal EB/Streymur royna seg á heimavølli móti LÍF, sum ikki er serliga væl koyrandi í løtuni, og har er væntandi at EB/Streymur fær trý stig afturat.

**HB-EB/Streymur 3-6 (3-0)**

1-0: Gunnar Mohr
2-0: Jónleif Sólsker
3-0: Jónleif Sólsker
3-1: Eyðfinn Joensen
3-2: Knút Vesturtún
3-3: Jón Sigurd Gleðisheygg
3-4: Kaj Joensen
3-5: Jón Sigurd Gleðisheygg
3-6: Jón Sigurd Gleðisheygg



*Leikandi venjarin hjá HB mundi iðra seg eftir tapið móti EB/Streymi leygardagin*

***Mynd: Álvur Haraldsen***




*Sumbingar ætlaðu so avgjørt ikki, at B36 skuldi fáa tað lætt á Krossinum hesa ferð. Ætlanir teirra vórðu tó skotnar sundur og saman, nærum áðrenn dysturin var byrjaður*

***Mynd: Áki Bertholdsen***

# Spenningurin hvarv

*1. deild: B36 avgjørdi dystin á Krossinum nærum áðrenn hann var byrjaður, og nú eru havnarmenninir aftur farnir at hóma heiðursmerkini*

JÁKUP MØRK

B36-Sumba 4-0 (3-0)

Tey árini Sumba hevur verið í fremstu fótbóltsdeildini, hevur B36 verið eitt av liðunum, sum lítlar ella ongar trupulleikar hevur havt av at basa sumbingunum.

Hesu ferð kundi tó roknast við, at støðan fór at vera nakað øðrvísi. B36 hevur ikki havt tað nakað serligt síðani fyrra dystin móti Sumba, sum samstundis var seinasti dystur hjá John Petersen. Sumba hevur tó heldur ikki gjørt tær stóru skrytirnar seinastu umførini, men spælið hevur tó verið á eini leið, so vónirnar høvdu teir í øllum førum.

**Vónirnar brustu**

Vónirnar hjá heimamonnunum lógu tó skjótt í skeljasori, tí dysturin var ikki meira enn tveir minuttir gamal, tá B36 hevði togað seg tvey mál fram um.

Í fyrstu álopsroyndini átti B36 innkast í vinstru. Håkan Lundholm tveitti bóltin inn um sumbiar verjuna, og næstan av baklinjuni royndi Maciej Maryniak, seg við einum skoti. Í besta Van Basten stíli sigldi bólturin upp um Eigil Olsen í málinum, áðrenn hann legði seg til rættis í handara síðuneti.

Sumba hevði ikki meira enn givið bóltin upp, so var aftur galið. Ein bóltur varð stungin inn um verjuni eftir miðásini, og púra einsamallur við málverjanum kundi Jens Kristian Hansen langa bóltin í meskarnar.

Hóast tað enn vóru 88 minuttir eftir at leika, so var tað eftir ógvusligu byrjanina nærum avgjørt, hvar stigini skuldi fara. Sumbingar tóktust eisini at hava ásanna, at uppgávan nú var nærum vónleys.

Í øllum førum megnaðu teir als ikki at leggja nakað veruligt trýst á B36 liðið, hóast B36 dovnaði heilt nógv, tá trygga leiðslan varð veruleiki.

Tað eydnaðist B36 at økja enn meira um munin, áðrenn farið varð til hálvleiks. Jens Kristian Hansen, sum nú aftur var at síggja á miðvøllinum, fann Maciej Maryniak, og einsamallur við málverjanum kundi pólverjin økja upp í 3-0.

**Avgreiðsluspurningur**

Seinastu trý korterini av dystinum tóktust bæði liðini bert at vera áhugað í at fáa tíðina at ganga.

B36 lat so at siga alt spælið frá sær, men hóast sumbingarnir høvdu bóltin nógv, varð talan ikki um teir stórur málmøguleikarnar. Í løtum megnaðu teir at leggja eitt sindur av trýsti á mótstøðumenninar, men tá hetta varð gjørt, opnaðu teir eisini fyri møguleikum til kontra, og B36 hevði eisini onkran heilt góðan møguleika, sum kortini varð misnýttur.

Móti endanum av dystinum varð sigurin staðfestur, tá Darius Magdisauskas var hægstur eftir hornaspark, og við høvdinum beindi hann bóltin í netið. Líkt er til, at B36 við litavanum hevur fingið eitt vandamikið vápn til deyðbóltsstøður. Hetta var í øllum førum nakað, sum vágamenn í fleiri førum fingu gjørt nýtslu av, meðan teir høvdu verjuleikaran í hópinum, og einki er at ivast í, at teir í B36 eisini hava lagt hesar dygdir til merkis.

**Hóma heiðursmerki**

Við sigrinum fekk B36 aftur meira ferð á stigainnsavnanina, sum annars hevur verið nærum fullkomuliga uppsteðgað. Komandi vikuskifti koma sandoyingar á vitjan, og verður talan tá aftur um try stig, munnu fleiri av viðhaldsfólkunum aftur fara at tosa um heiðursmerki.

Tað telur eisini til fyrimunar fyri havnarmenninar, at teir bert hava ein dyst eftir uttan fyri høvuðsstaðin, meðan fýra av teimum fimm írestandi dystunum verða leiktir í Gundadali. Um teir so megna at gera nýtslu av hesum fyrimuni er ein heilt annar spurningur, sum ikki er svaraður fyrr enn kappingin er liðugt leikt.

**Nú stendur á**

Hjá sumbingum er støðan heilt øðrvísi, og undir øllum umstøðum meira hættislig.

Komandi vikuskifti skuldu teir ferðast vestur á Vágoynna, og eftir øllum at døma er hetta ein lykladystunum í niðurflytingarstríðnum. Í heimadystinum móti vágamonnum megnaðu sumbingar at toga ein tepran sigur í land, og verður hetta endurtikið, er einki at ivast í, at sumbingar eru nøgdir.

**Sumba-B36 0-4 (0-3)**

0-1: Maciej Maryniak 2.
0-2: Jens Kristian Hansen 3.
0-3: Maciej Maryniak 33.
0-4: Darius Magdisauskas 85.

Dómari: Lassin Isaksen

**Sumba:**
Eigil Olsen – Trygvi Nielsen, Dánjal Johan Joensen, Mortan úr Hørg – Nikola Biberdzic, Jan Poulsen, Spasojé Biberdzic, Hans Jacob Thomsen, Hallur Dam Joensen, Sasa Tomajek – Nebosja Veljkovic

**B36:**
Tróndur Vatnhamar – Darius Magdisauskas, Egil Zachariassen, Fróði Clementsen – Jan Guttesen, Mikkjal Thomassen, Jens Kristian Hansen, Håkan Lundholm – Jørgen Meitilberg, Maciej Maryniak, Magni á Lakjuni



# Fjáltursstungið spæl í Klaksvík

*Generalroyndin hjá GÍ var lítið sannførandi, og klaksvíkingar tóktust darvaðir av, at ferðin ofta var í so høg*

KÍ-GÍ 2-1 (1-0)

Klaksvíkingar ætla sær at enda omanfyri gøtumenn á stigatalvuni, og eftir heimasigurin í grannauppgerðini er tað meiri sannlíkt, at tað fer at eydnast hjá KÍ at vinna grannastríðið, enn tað er hjá gøtumonnum.

Bæði liðini vóru darvaði av, at lyklaspælarar restaðu í góðveðrinum í Klaksvík. Liðformaðurin hjá KÍ, Jan Joensen, var burturstaddur, og hjá GÍ noyddist Poul Ennigarð enn eina ferð at sita uttanfyri við skaða.

KÍ og GÍ hava ofta spælt fínar fótbóltsdystir, men sunnudagin livdu avrikini ikki upp til tað, sum tað kann roknast við av tveimum liðum, sum bera so nógv góð fótbóltsevni í sær.

Leikferðin var ofta høg, og tað darvaði. Tað bar við sær, at tað var trupult hjá spælarunum at temja bóltarnar, og avspælið var ov ofta ov lítið neyvt.

Bæði liðini misnýttu stórar møguleikar, og báðir málverjarnir sýndu góðar bjargingar. Zoltan í KÍ málinum bjargaði tríggjar ferðir heilt væl, og Sunnvard Joensen í GÍ málinum, sum ivaleyst var besti gøtumaðurin hesa ferð, vardi sera væl, tá hann tveitti seg í skotroynd frá Rógva Jacobsen, sum var leysur í málteiginum.

**Málini**

KÍ setti seint í fyrra umfarinum hol á. Ove Nysted, sum var einsamallur heilt á toppinum og hevði Rógva Jacobsen eitt vet aftanfyri seg, var púra leysur, tá innleggið frá Marek kom innfyri, og so sóu Leivur Hansen og allir hinir gøtumenninir, at tað er ein dáragerð at Ove Nysted mitt fyri málinum sleppur at brúka høvdið.

Gøtumenn vóru eitt sindur misnøgdir við fyrra málið hjá KÍ. Teir hildu seg eiga innkastið, sum bar innleggið frá Marek við sær. Dómarin og linjuverjin vóru ikki samdir við Magna Jarnskor, sum var á veg fram á vøllin.

Í 2. hálvleiki økti KÍ skjótt um leiðsluna. Teir høvdu leingi tak á, og sjálvt um bólturin síðstu løtuna var nógv á KÍ hálvuni, og klaksvíkingar høvdu lyndi at taka seg aftur, og GÍ royndi at leggja trýst á, so var heimasigurin ongantíð hóttur.

Heðin á Lakjuni, sum eftir leikbannið í Vági var aftur á miðvøllinum í vinstru, var meistari fyri uppspælinum fyri seinna KÍ málinum. Hann streyk til baklinjuna í vinstru og legði út frá til Ove Nysted, sum var so mikið leysur, at hann fekk høvi at snara um seg sjálvan, áðrenn hann fyri aðru ferð setti bóltin í netið. Stór frøði í KÍ leguni, har teir síðani 18. juni hava bíðað eftir kensluni aftur at fáa trý stig.

Síðstu løtuna kundi tað verið óneyðuga spennandi. GÍ minkaði um munin, og tað var vorðið sum mál, sum Súni Olsen skoraði. Eftir at hann hegnisliga hevði tamt langa sending, fór hann framvið tveimum, tveir tveittu seg og hoppaðu upp á skotfintuna, og so var lætt at trilla bóltin framvið sakleysa málverjanum. Gøtumenn royndu at gera skjótt av, eftir at teir høvdu minkað um munin, men tá vóru teir ikki serliga nærgangandi.

**Vánalig undanroynd**

Fyri bæði KÍ og GÍ er tað eyðkent, at tey í fyrstu atløgu ikki hava serliga nógv at spæla um. Gøtumenn royndu undan dystinum at billa sær sjálvum inn, at teir høvdu møguleikan at røkka heiðursmerkjaplássi. Teoretiski møguleikin er har framvegis, men hann er lítil ella næstan eingin.

GÍ ætlaði at brúka dystin sum undanroynd til Europa Cup dystin í Svøríki komandi hóskvøld, men hetta miseydnaðist. Eftir at tað hevði hingið hampuligt saman fyrsta korterið vórðu teir óneyvir og spældu við longum og høgum bóltum. Hetta hevur ikki verið eyðkennið hjá GÍ.

Teir spældu við trimum á linju í verjuni. Bartal Eliasen, sum hevur staðið seg so serliga væl síðstu tíðina, var ein skuggi av sær sjálvum. Helgi L. Petersen og Súni Olsen spældu aftanfyri Óla Hansen, sum var einsamallur á toppinum. Súni Olsen var einasti útispælarin hjá GÍ, sum rættuliga kundi vera nøgdur við sítt avrik.

KÍ stríddi seg til ein kærkomnan sigur, eftir at tað hevði kiksað fleiri ferðir. Endaskráin hjá klaksvíkingum tykist eitt sindur minni torfør enn hjá oddaliðunum, og møguleikin fyri heiðursmerkjum er framvegis til staðar, men hann er alt annað enn stórur. Hesa ferð dúvaði venjarin bara upp á royndar spælarar. Ungu menninir sótu á beinkinum alla tíðina, og í síðsta enda eydnaðist tað veteranunum at basa GÍ. Tað kom væl við.

JH

**KÍ-GÍ 2-1 (1-0)**

1-0: Ove Nysted 34
2-0: Ove Nysted 55
2-1: Súni Olsen 87

Dómari: Suni Johansen

**KÍ**
Zoltan Kujundric – Harley Bertholdsen, Andrzej Pacek, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Arnold Joensen, Símn Waag Høgnesen, Marek Wierzbicki, Heðin á Lakjuni – Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni

**GÍ:**
Sunnvard Joensen – Jóan Petur Olsen, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Pól Henning Jacobsen, Magni Jarnskor, Pauli Jarnskor, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen, Súni Olsen




*Føroyameistarar verða teir neyvan aftur í ár, men við sigrinum á GÍ varveitti KÍ um ikki annað vónina um heiðursmerki*

***Mynd: SJH***



*Hóast teir eitt skifti vóru á oda 2-0, máttu fuglfirðingar taka til takkar við javnleiki móti GÍ*

# ÍF snávaði móti endanum

*2. deild: Niðurflytararnir hava trupulleikar við at fóta sær í stríðnum um uppflytingina, og í dystinum móti grannunum úr Gøtu mistu teir tvey týdningarmikil stig, tá GÍ javnaði móti*

*endanum*

STEFAN Í SKORINI

ÍF varð á síðsta leikdegi í fjør dømt at spæla í næstbestu deildini í ár, men tað hevur verið torført hjá teimum at víst seg sum ein av veruligu favorittunum at endurvinna sætið í 1. deild.

ÍF sat á meginpartinum av dystinum, men megnaði hóast tað ikki at fáa trý stig burturúr. Í fyrra hálvleiki var tað bara eitt lið, sum hevði nakað at bjóða uppá, og tað var ÍF. Hóast stóru leikligu yvirvágina fingu fuglfirðingar bara eitt mál fyri steðgin. Tað var Eyðálvur Petersen, sum legði gestirnar framum 1-0, men munurin kundi verið størri.

Fyrra part av seinna umfari var tað eisini ÍF, sum sat á dystinum. Bárður á Lakjuni økti um leiðsluna eitt korter inn á seinna hálvleik, men so tók dysturin eina vend. GÍ flutti Símun Petur Justinussen úr verjuni uppá miðjuna, og tað var serliga har, at GÍ hevði havt yvirtakið. Hetta setti nakað av ferð á GÍ liðið, sum nú flutti spælið longur niðan á vøllin. Annars hevði tað mesta av spælinum verið niðri á GÍ hálvuni.

Per Dalheim var hetjan á GÍ liðnum. Hann skeyt bæði málini hjá heimaliðnum og tryggjaði harvið GÍ eitt stig, sum er týdningarmikið fyri at sleppa undan niðurflytting, ið ikki er so langt burtur. Bæði málini komu við sera stuttum millumbili, tá eitt korter var eftir at spæla.

Eftir hetta kundi tað farið báðar vegir, og Símun Petur Justinussen hevði eitt skot á træverkið, men liðini fingu eitt stig í part, men tað kunnu fuglfirðingar avgjørt ikki verða nøgdir við, um teir skulu verða við í stríðnum um uppflyting til bestu deildina. ÍF snávaði sostatt í hesum dystinum, og teir eru við at dragna í stríðnum um uppflyting, tí bæði TB og EB/Streymur vunnu sínar dystir.

Í næstu viku skal ÍF hava B36 á vitjan, og eftir avrikinum hjá B36 á Tvøroyri at døma, so eigur ÍF at vinna henda dystin. Eitt er tó greitt, og tað er at ÍF nú skal hava fulla úrtøku burturúr dystunum, sum eftir eru, fyri at flyta upp.

**ÍF-GÍ 2-2 (1-0)**

1-0: Eyðálvur Petersen
2-0: Bárður á Lakjuni
2-1: Per Dalheim
2-2: Per Dalheim